LANDSVERK

26. juni 2026

Vinnumálaráðið

# VIÐMERKINGAR Í SAMBANDI VIÐ ÆTLAN UM BROYTINGAR Í ÁBYRGARBÝTINUM FYRI  BYGGIVERKÆTLANIR HJÁ LANDINUM

Í sambandi við at landsstýrið arbeiðir við at broyta skipanina viðvíkjandi byggiverkætlanum, vil Landsverk koma við íkasti til hetta arbeiðið.

> Landsverk mælir frá at spjaða byggiharrauppgávuna aftur til einstøk ráð og stovnar, men mælir til at styrkja verandi miðsavnaðu skipan við greiðari ábyrgdarbýti og betri samstarvi.

Í samgonguskjalinum stendur, at "Ábyrgd fyri almennum verkætlanum skal liggja hjá tí stovni ella ráði, sum hevur játtanina á fíggjarlógini". Tað kundi bent á, at byggiumsitingin skal flytast "aftur" til ráð og stovnar. Ein umskipan, sum Landsverk - umframt onnur sum varða av byggiverkætlanum - hevur víst á, kann hava fleiri óhepnar avleiðingar við sær. Hóast ein umskipan kann hava onkran fyrimun við sær, t.d. greiðari ábyrgdarbýti, eru vansarnir stórir og ikki til at koma uttanum.

Skipanin, vit hava í dag, varð grundað fyri 25 árum síðan. Táverandi samgonga undir leiðslu av Anfinni Kallsberg, løgmanni, gjørdi av, at øll byggiumsitingin hjá landinum frá 1. januar 2001 skuldi savnast á einum stað - hjá Landsverkfrøðinginum, sum seinni broytti navn til Landsverk. Við umskiftinum fekk Landsverkfrøðingurin ábyrgd av at stýra, planleggja og umsita allar stórar byggiverkætlanir hjá landinum. Fram til 2001 lá byggiumsitingin nevniliga spjadd úti í ymsu stjórnarráðunum. Grundgevingin fyri at lata byggiumsitingina til Landsverk var, at tað fakliga og fíggjarliga var mett at vera best at savna hetta arbeiðið á einum stað, heldur enn at hvørt einstakt stjórnarráð hevði egna byggiumsiting. So kundu stjórnarráðini brúka orkuna til síni kjarnuøki. Sostatt var tað eitt tilvitað val at flyta byggiharraleiklutin úr einstøku ráðunum og yvir í ein og sama stovn.

## FYRIMUNIR VIÐ MIÐSAVNAN

Skipanin í dag virkar á tann hátt, at einstaka stjórnarráðið er ánari, men letur uppgávuna at vera byggiharri til Landsverk, sum tí er innkeypari av allari ráðgeving, arbeiðum og tænastum, sum eru neyðug til at útinna verkætlanina. Hendan skipanin hevur fleiri fyrimunir, m.a.:

- Nútímans KT-skipanir innan bygging og fíggjarstýring o.a. hjá byggiharra
- Tvørfaklig kompetansa við fleiri starvsbólkum innan eitt nú verkfrøði, byggifrøði, byggi- og útboðsløgfrøði, maskinmeistarar, HTÚ, búskaparfrøði og arkitektur
- Vitan verður verandi í organisatiónini og kann brúkast til aðrar verkætlanir
- Byggiharra-verkætlanarstýring sum kann hava ábyrgd av stórum verkætlanum
- Stórrakstrarfyrimunir sammett við nógvar og smærri eindir
- Áhaldandi førleikamenning sum byggiharri

Yviri við Strond 17 // Postsmoga 78 // FO-110 Tórshavn // Tel. +298 340 800 // lv@lv.fo // www.landsverk.fo

Eins og í okkara grannalondum hava nakrar almennar byggiverkætlanir í Føroyum verið í neiligum fokus, eitt nú Glasir og H-bygningurin. Verkætlanirnar gjørdust dýrari enn upprunaliga játtanin, høvdu nógvar broytingar, og ógreiða var um ábyrgdarbýtið. Mistøk, sum eisini Landsverk hevði ábyrgdina av. Lærdómurin, sum skipanin hevur tikið við sær er, at verkætlanirnar vóru ikki nóg neyvt fyrireikaðar frá byrjan, at ósamsvar var millum játtan og ynski um veiting, og at fíggjarstýringin var ófullfíggjað.

## ÁTØK Á LANDSVERKI

Sum beinleiðis uppfylging upp á hetta hevur Landsverk seinastu árini miðvíst sett fleiri átøk í verk fyri at tryggja, at verkætlanir halda kósina og ikki fara av sporinum. Verkætlanarstýringin hjá byggiharranum og fíggjarstýringin eru styrktar soleiðis, at til eina og hvørja tíð ber til at fáa eina dagførda mynd av fíggjarstøðuni í øllum verkætlanum undir Landsverki.

Umframt sínar fakligu útbúgvingar hava starvsfólkini fingið útbúgving í verkætlanarleiðslu hjá byggiharranum. Eisini eru fastar mannagongdir fyri, hvussu verkætlanir verða útintar. Neyvar leiðreglur eru fyri dokumentatión, og ein óheft controllarafunktión er sett á stovn.

Eitt annað átak er, at fyri allarflestu byggiverkætlanir verður settur ein stýrisbólkur við umboði fyri ánara (stjórnarráðið), byggiharra (Landsverk) og so stovnin, sum umbiður bygningin. Hetta er við til at tryggja eina áhaldandi kunning, og at betri samsvar er millum ætlan og tað, sum verður bygt – bæði viðvíkjandi góðsku, tíð og játtan.

Samanumtikið eru fleiri týðandi stig tikin fyri styrkja fíggjarstýring, verkætlanarleiðslu hjá byggiharranum og fakliga umhvørvið. Seinastu árini eru flest allar verkætlanir avgreiddar við góðum úrsliti og uttan stórvegis avbjóðingar á leiðini.

## FAKLIG SPJAÐING OG DÝRARI LOYSNIR

At tað nú verður umhugsað at leggja byggiumsitingina og byggiharraleiklutin aftur til stjórnarráðini ella stovnar kann hava fleiri vansar við sær:

- Stjórnarráðini ella stovnar mugu hvør í sínum lag menna egnar byggiumsitingar og byggiharraførleikar
- Fakligheitin spjaðist
- Minni samlað yvirlit yvir almennar byggiverkætlanir - systemvitan hvørvur
- Størri vandi fyri mistøkum og verri tøkniligum loysnum, tí tvørfakliga eygað vantar
- Fleiri byggiharraeindir kunnu elva til, at ymiskir leistir verða brúktir, og tað verður ójavnt, hvussu byggiverkætlanir verða útintar
- Dýrari verkætlanir við miðspjaðing og fleiri smáum byggifyrisitingum

Tá ið vit tosa um, at byggiharrauppgávan skal "aftur" til stjórnarráðini, er eisini vert at hava í huga, at heilt onnur og størri krøv eru til bygging í dag enn fyri 25 árum síðan. Tað fer at krevja sera nógv av hvørjum einstøkum stjórnarráði ella stovni nú at átaka sær uppgávuna at vera byggiharri og at menna sær fakligu førleikarnar til hetta. Ein avleiðing kann gerast, at minni orka verður til kjarnuuppgávunar, sum ráðið ella stovnurin eru sett til at loysa.

Harumframt kann sigast, at hvørt einstakt ráð ella stovnur fer at hava lutfalsliga fáar byggiverkætlanir og fer at hava torført við at byggja upp neyðugar førleikar og royndir sum skikkaður byggiharri.

Greiðar ábendingar eru um, at flestu stjórnarráð ikki hava ynski um at átaka sær byggiharrauppgávuna og verkætlanarstýringina, tí tey meta hana liggja betur miðsavnað. Hetta sæst í frágreiðingini, "Endurskoðan av skipanini við almennum byggiverkætlanum", sum ein arbeiðsbólkur undir Løgmansskrivstovuni læt úr hondum í oktober 2023. Í frágreiðingini vísa fleiri stjórnarráð á vansar við eini skipan, har ábyrgdin fyri almennu byggiverkætlanunum skal aftur til ráðini.

## FLEIRI ATLIT

Landsverk er av teirri sannføring, at eitt greitt ábyrgdarbýti er sera umráðandi, men hetta hava onnur lond megnað at fáa loyst og framvegis hava ein miðsavnandi stovn sum byggiharri. Eisini hevur tað týdning at vísa á, at ábyrgdarbýtið er ikki einasta atlitið, sum skal takast. Onnur týdningarmikil atlit eru, eitt nú sterk tvørfaklig kompetansa, skikkaður byggiharri og ein effektiv organisatión.

Landsverk vil ávara ímóti at liða sundur tøkniligu skipanirnar og tvørfakligu førleikarnar, sum eru uppbygd seinastu fjórðingsøldina. Heldur eiga vit at styrkja hesar skipanir og førleikar enn meira, til gagns fyri bæði borgarar, stovnar, vinnulív og politisku skipanina.

Á Landsverki vilja vit fegin vera við í einum konstruktivum samstarvi um at lyfta stigið á almennum byggiverkætlanum enn meira.

Vinarliga

Marjun Weihe Thomassen, stjóri á Landsverki